# Tendensurin er greiður

8 DAGAR Løgtingsvalið 2008

**Sambandsflokkurin gerst størsti flokkur og fær ein mann afturat, meðan Tjóðveldi og Fólkaflokkurin missa ein tinglim. Báðir teir smáu flokkarnir økja sítt tingmannatal. Javnaðarflokkurin gongur aftur, men varð-veitir eitt óbroytt tingmannatal**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*




Tað eru ikki tey stóru sveiggini at hóma í nýggjastu veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, og tendensurin, sum vit hava sæð seinastu mánaðirnar, verður staðfestur.

Samgongan varðveitir sínar 21 tinglimir, hóast eitt lítið sindur av útskifting er. Fólkaflokkurin missir ein tinglim, og Sambandsflokkurin fær ein.

Sambandsflokkurin stendur til at fáa eitt gott val við 24 prosentum av atkvøðunum, sum er ein lítil framgongd á 0,3 prosent.

Stóri taparin á valinum um átta dagar verður Fólkaflokkurin sambært kanningini. Listi A hevur eina afturgongd á heili 2,7 prosent og liggur nú á 17,9 prosentum. Standardsvarið frá fólkaflokmonnum plagar at vera, at flokkurin vanliga ikki stendur seg væl í veljarakanningum, og at afturgongdin í veruleikanum kann vísa seg at vera minni.

Javnaðarflokkurin hevur eina afturgongd á 1,8 prosent og fær 20,1 prosent, men varðveitir tó sjeynda mannin í tinginum.

Javnaðarflokkurin situr sambært hesi kanningini á tí 33. mandatinum, og missir flokkurin hetta mandatið, fer tað helst til Tjóðveldi ella til Sambandsflokkin.

Miðnámsflokkurin kemur ikki inn á ting, men um tað skuldi eydnast, so missir Javnaðarflokkurin sítt sjeynda mandat. Triðja umboðið hjá Miðflokkinum gerst so tað 33. mandatið í kapping við Javnaðarflokkin og Tjóðveldi.

## Tjóðveldi gongur aftur

Stóri andstøðuflokkurin hevur eina elalítla afturgongd á 0,1 og missir ein tinglim. Tjóðveldi gjørdist á seinasta vali triðstørsti flokkur í atkvøðum, men gjørdist størsti flokkur í tingmannatali við átta sessum í løgtinginum.

Tjóðveldi megnaði tá at fáa átta valdømisvald tingfólk. Henda yvirumboðan stóðst av reglunum í táverandi valskipan, men eftir broytingina í valskipanini er slík yvirumboðan ikki møgulig á sama hátt, og tí missir Tjóðveldi ein tinglim, hóast flokkurin stendur í stað.

## Lítlu flokkarnir ganga fram

Sjálvstýrisflokkurin hevur brynjað seg út við nógvum nýggjum valevnum til hetta valið, og tað sæst aftur í kanningini. Næstelsti flokkurin gongur fram við 1,3 prosenti og fær tveir tinglimir.

Sjálvstýrisflokkurin hevur ligið tungt í vatnskorpuni seinastu árini og er í nøkrum veljarakanningum farin niðurum tinggáttina og hevur mist sína tingumboðan. Hendan gongdin heldur tó ikki fram sambært hesi kanningini.

Miðflokkurin hevur størstu framgongdina í prosentum. Kristiligi flokkurin hevur eina framgongd á 3,5 prosent og fær samanlagt 8,7 prosent. Miðflokkurin fær sostatt ein tinglim afturat samanborið við síðsta val. Havandi í huga at tingbólkur Miðfloksins seinasta árið hevur talt tríggjar tinglimir er hetta tó status quo.

Samanumtikið er hetta tann sami tendensurin, sum hevur verið at sæð í veljarakanningum seinastu tíðina. Sambandsflokkurin stendur sterkt, meðan hinir báðir samgonguflokkarnir ganga aftur. Tjóðveldi stendur so at siga í stað í atkvøðum, hóast flokkurin missir ein tinglim.

Tað hevur verið greitt, at Miðflokkurin fer at fáa eitt gott val, og hendan gongdin er staðfest í hesari kanningini. Sjálvstýrisflokkurin hevur fingið nógv nýggj andlit, og tað sæst eisini aftur. 2.000 fólk eru spurd í veljarakanningini.

# Sjálvstýrisflokkurin drúgvasti samgonguflokkur

**Í teimum seytjan valskeiðunum, sum hava verið síðani 1948, hevur Sjálvstýrisflokkurin veirð partur í teimum 13. Fólkaflokkurin er næstur við 12, meðan Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava verið í 10 samgongum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

| | 48-50 | 50-54 | 54-58 | 58-62 | 62-66 | 66-70 | 70-74 | 74-78 | 78-80 | 80-84 | 84-88 | 88-90 | 90-94 | 94-98 | 98-02 | 02-04 | 04-08 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | | A | A | | A ! | | | A | A | A | | A ! | A | A | A ! | A ! | A |
| Sambandsflokkurin | B ! | B ! | B ! | B | | B ! | B | | | B ! | | B | | B ! | | | B |
| Javnaðarflokkurin | C | | | C ! | | ! C | C ! | C ! | C ! | | C ! | | C ! | C | | | C ! |
| Sjálvstýrisflokkurin | D | D | | D | D | D | D | | | D | D | D | D | D | D | D | |
| Tjóðveldisflokkurin | | | | | E | | | E | E | | E | E | E | | E | E | |
| Miðflokkurin | | | | | | | | | | | | | | | | H | |
| Framburðs/Krf | | | | | Framb | | | | | | KrF | KRF | | | | | |
| Framsóknarflokkurin | | | | | | | | | | | FR | | | | | | |
| Verkamannafylkingin | | | | | | | | | | | | | | ver | | | |

! Hesin flokkur hevur løgmann

Síðani Føroyar fingu heimastýri í 1948 hava verið 17 løgtingsvalskeið, og vit kundu sagt seytjan samgongur. Men tað er kortini ikki rætt, tí samgongur hava nakrar ferðir verið broytar í einum valskeiði, hóast tað ongantíð er hent, at ein samgonga er farin frá, og ein onnur hevur tikið við, uttan at nýval hevur verið útskrivað.

Síðani 1948 hava vit fimm ferðir havt løgtingsval í ótíð, tað var í 1980, 1990, 1994, 1998 og í 2004. Tó skal sigast, at í 1980, í 1990 og í 2004 varð val útskrivað, tá valskeiðið var hálvrunnið, meðan tað í 1994 og í 1998 varð útskrivað fáar mánaðir fyri, at valið skuldi verið hildið.

Tað er Sjálvstýrisflokkurin, sum hevur verið drúgvasti samgonguflokkurin, hann hevur verið í 13 landsstýrissamgongum. Tað er kanska ikki av ongum, at hann fyrr varð kallaður kittflokkurin, tí hann passaði til allar samgongur, tí longu í 1962 hevði hann roynt samstarv við allar flokkar, meðan eitt nú Javnaðarflokkurin ikki fyrr enn eftir valið í 1974 royndi samstarv við Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Fólkaflokkurin er tann, sum hevur verið í næstflest samgongum. Hann hevur verið í 12 samgongum. Serliga drúgvur hevur hann verið síðani 1988. Hann hevur seinasta 20 árini verið í samgongu í 17 ár. Marita Petersen segði upp samstarvið millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin í 1993. Tá komu Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrsflokkurin upp í samgonguna. Tá Javnaðarflokkurin fór úr samgonguni hjá Edmund Joensen í 1996, tók Fólkaflokkurin kjansin og fór uppí. Javnaðarflokkurin roknaði helst við nývali, men úrslitið var, at Fólkaflokkurin fekk valdið, og hann hevur sitið í samgongu síðani.

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava báðir verið í samgongu 10 ferð-ir. Fyrstu árini samstarvaðu teir nógv. Teir vóru báðir í fyrstu samgonguni. Men í 1950 kastaðu Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin saman, men í 1958 rann saman aftur millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Eftir valið í 1974 kom vátt í reiðrið – og flokkarnir funnu ikki saman aftur fyrr enn í 1994 – tá bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin høvdu skift formenn.

Tjóðveldisflokkurin hevur sitið í átta samgongum. Tjóðveldisflokkurin kom ikki í samgongu fyrr enn í 1962 – og hann slapp ikki aftur í samgongu fyrr enn eftir valið í 1974. Síðani tá hevur hann verið í fleiri samgongum.

Framburðsflokkurin hjá Kjartan Mohr – seinni æt hann eisini Kristiligi Fólkaflokkurin, var stuðulsflokkurin hjá sjálvstýrislandsstýrinum í 1962 uttan at vera við í landsstýrinum. Seinni hevði KrFFF sæti í samgonguni hjá Atla Dam í 1984-88. Men tá grein 266b var fyri í januar í 1988 fór KrFFF úr samgonguni, og Framsóknarflokkurin hjá Adolf Hansen kom í staðin.

Verkamannafylkingin vara bara á tingi í valskeiðinum frá 1994 til 1998 – og var við í samgonunum – bæði tá Javnaðarflokkurin var við, og tá Fólkaflokkurin kom í hansara stað í 1996.

Talvan omanfyri vísir, nær ymsu flokkarnir hava sitið í samgonu. Viðmerkjast skal, at vit nýta árstølini tá løgtingsval hevur verið – oftast var val í november, og næstan altíð varð farið um ársskiftið, áðrenn samgonga var skipað – kortini nýta vit árstølini, tá løgtingsval var.